heldin

**Sáttmáli um Heldina, millum "luttakara" og Gjaldstovuna - Talgildu Føroyar, hereftir TF**

GJALDSTOVAN

# INNIHALDSYVIRLIT

**Inngangur** ..... **4**

**Endamál** ..... **4**

**Lýsing av hugtøkum** ..... **4**

Heldin ..... 4

Luttakari ..... 6

KT skipan ..... 6

Vevtænastuveitari ..... 6

Vevtænastubrúkari ..... 6

Heldardepilin ..... 7

Heldarumsitingarskipanin (HUM) ..... 7

Supportskipan - Jira Service Management (JSM) ..... 7

Sertifikat ..... 7

**Samskiftispersónar** ..... **7**

Fyri luttakarar á Heldini ..... 7

Fyri TF ..... 8

**Ábyrgd, skyldur og tænastur veittar av TF** ..... **8**

Yvirskipað lýsing av tænastunum ..... 8

Góðkenning av luttakarum ..... 8

Sertifikat og forrit ..... 8

Yvirlit yvir tøkar vevtænastur ..... 8

Atgeingi og tænastuvindeygu ..... 9

Support ..... 9

Trygdaravritan ..... 9

Yvirvaking ..... 9

Logging ..... 9

**Ábyrgd og skyldur hjá luttakarum** ..... **10**

Ábyrgdarin ..... 10
Tøkniligir persónar ..... 10
Yvirskipað lýsing av skyldum ..... 10
Áðrenn íbinding ..... 10
Change Management ..... 10
Trygdarambætari og tilknýttar skipanir ..... 11
Logging ..... 11
Trygdarhendingar ..... 11
Stýring av atgongd ..... 12
Brúkaratrygd ..... 12
Tilbúgvingarætlan ..... 12
Trygdaravrit ..... 13
Útbúnaður ..... 13
Menning av forritum ..... 13
**Prísmyndil ..... 13**
**Endurskoðan av sáttmála ..... 13**
**Fráboðan ..... 13**
**Mishald. ..... 14**
**Force majeure ..... 14**
**Uppathald ..... 14**
**Undirskrift ..... 14**

# Inngangur

Í rundskrivinum um Heldina er ásett, at ein sáttmáli um tænastustig skal gerast millum TF og teir myndugleikar, sum ynskja at knýta seg í Heldina. Hesin sáttmáli er tískil gjørdur við støði í ásetingunum í rundskrivinum, og ásetingarnar eru sostatt eisini galdandi fyri teir stovnar og virki, sum skriva undir henda sáttmála.

# Endamál

Endamálið við hesum sáttmála er at lýsa samstarvið millum TF, sum umsitari og ábyrgdarmyndugleiki av Heldini, og luttakara, sum verður knýttur í Heldina. Luttakarin fær soleiðis eitt yvirlit yvir tænastur og tænastustig, sum TF skal veita, og upplýst verður, hvørja ábyrgd luttakarin hevur í hesum sambandi.

Hesin sáttmáli fevnir eisini um hesi fylgiskjøl:

- Fylgiskjal 1 – Dátuflokking
- Fylgiskjal 2 - Tilbúgvingarætlan

Hesin sáttmáli fevnir ikki um viðurskifti millum luttakarar á Heldini. Hesi viðurskifti eiga at verða lýst í sínámillum avtalu millum luttakararnar, sum umfatar m.a. trúnaðarviðurskifti, atgongd til dátur og líknandi.

# Lýsing av hugtøkum

## Heldin

Heldin er eitt tøkniligt undirstøðukervi og ein fyriskipanarligur karmur, sum ger tað møguligt at hava trygt, skipað og bronglað dátusamskifti millum KT skipanir hjá luttakarum umvegis internetið.




.

*Mynd 1 Yvirskipað mynd av Heldini*

Myndin omanfyri vísir hvussu Heldin er samansett, og hvussu luttakarar eru knýttir í Heldina. Hvør luttakari hevur sínar egnu KT skipanir, sum eru teknaðar sum kassar ovast á myndini. Hesar verða knýttar í Heldina gjøgnum ein trygdarambætara umvegis ein millumambætara. Millumambætarin virkar sum eitt umsetandi lið millum skipaninar og trygdarambætaran. Sirkulin á myndini ímyndar hvar samskiftið fer fram, og hóast tað er teknað sum ein sirkul, so fer samskifti fram umvegis bronglaðar tunlar beinleiðis millum tveir luttakarar. Kassarnir til høgru (Heldardepilin) eru kjarnukomponentar, sum halda skil á hvør er hvør í Heldini og senda sertifikatir út til luttakararna, so at bronglaða samskiftið er trygt.




*Mynd 2 Staklutir í einum samskifti*

Hesin sáttmálin fevnir bert um viðurskifti millum TF og luttakaran og harvið tær tænastur, sum TF í hesum sambandi skal veita. Talan er um tann grøna kassan í myndini omanfyri. Myndin vísir hvussu samskiftið millum tveir luttakarar fer fram, og er hetta ein partur av kervinum frá fyrru myndini.

Avtala skal verða gjørd millum luttakarar, sum veita dátur, og luttakarar, sum móttaka dátur, um hvørjar dátur kunnu verða deildar. Hesa avtalu standa samskiftandi luttakarar sjálvir fyri og er tí ikki partur av hesari avtalu.

## Luttakari

Ein luttakari er ein almennur myndugleiki, eitt virki ella felag, hvørs KT skipan(-ir) er knýtt í Heldina, soleiðis at dátur kunnu deilast á ein skipaðan hátt við aðrar myndugleikar, virkir ella feløg, ið eisini eru knýtt í Heldina.

Ein luttakari kann vera bæði vevtænastuveitari og vevtænastubrúkari.

## KT skipan

KT skipanin sum skal samskifta umvegis Heldina sum vevtænastuveitari ella sum vevtænastu-brúkari.

## Vevtænastuveitari

Ein luttakari, ið eigur eina vevtænastu undir eini KT skipan, og sum umsitur dátur, sum aðrir myndugleikar kunnu umbiðja, verður umrøddur *vevtænastuveitari.*

## Vevtænastubrúkari

Ein luttakari, ið hevur eina KT skipan, sum kallar eina vevtænastu hjá einum vevtænastuveitara, verður umrøddur vev*tænastubrúkari.*

### Heldardepilin

Heldardepilin er eitt felagsheiti ið er samansett av hesum eindum: Sertifikat umsitingini (CA), tíðarstempultænastu (TSA), sertifikatstaðfestingartænasta (OCSP), miðambætarum, yvirvaking og aðrar innanhýsis tænastur. Hetta eru kjarnulutirnir i Heldini.

### Heldarumsitingarskipanin (HUM)

Heldarumsitingarskipanin er ein skipan har viðurskifti um Heldina og gerðir í hesum sambandi, verða viðgjørd. Hesi viðurskifti eru t.d. tilmelding og viðlíkahald av luttakara, viðgerð av umsóknum um vevtænastur, sertifikat umbønir, osfr.

### Supportskipan - Jira Service Management (JSM)

Support fer fram umvegis Jira Service Management skipanina hjá TF. Hetta er til spurningar, trupulleikar og annað support-kent samskifti. JSM kann finnast á https://support.talgildu.fo.

### Sertifikat

Eitt sertifikat er eitt talgilt prógv, sum eyðmerkir teir einstøku luttakarnar í Heldini. Sertifikatið prógvar, at ein luttakari er tann hann sigur seg vera. Tá tveir luttakarar samskifta, verða sertifikatini váttað av Heldini, so báðir partar trygt kunnu verða vísir í, at hin luttakarin er tann, hann sigur seg vera, og so at dátusamskiftið verður bronglað.

## Samskiftispersónar

### Fyri luttakarar á Heldini

Samskifti um viðurskifti knýtt at hesum sáttmála fer fram á tveimum stigum: Einum yvirskipaðum og einum tøkniligum stigi.

*Yvirskipaða samskiftið* umfatar at geva loyvir, knýta í Heldina og útnevna tøkniligar samskiftispersónar, ið taka sær av tøkniliga samskiftinum. Stjórin hjá luttakara hevur evstu ábyrgd av yvirskipaða samskiftinum, men kann útnevna ein ábyrgdarpersón (Heldarábyrgdarin), ið fær heimild at geva loyvir og útnevna tøkniligar samskiftispersónar, vegna stjóran. Samskifti fer fram umvegis HUM.

*Tøkniliga samskiftið* umfatar t.d. uppseting av trygdarambætarum, gerð av sertifikatumbønum, tilmelding av KT skipanum, og annars spurningum ið kunnu verða ísv. knýti í Heldina. Ábyrgdarpersónurin hjá luttakaranum útnevnir tøkniligar samskiftispersónar í umsóknini um knýti í Heldina. Tøkniligir samskiftispersónar kunnu t.d. vera ein innanhýsis teknikari ella ein uttanhýsis veitari av ambætarum. Er ongin tøkniligur samskiftispersónur nevndur, er ábyrgdarpersónurin sjálvur tøkniligur samskiftispersónur. Luttakarin kann hava ymiskar tøkniligar samskiftispersónar

fyri hvørja KT skipan/vevtænastu. Samskifti um tøknilig viðurskifti fer ***bert*** fram við hesar ásettu persónarnar, t.e. stjóran, ábyrgdarpersón ella tøkniliga samskiftispersónin, sum gera neyðugu tøkniligu uppsetingina hjá luttakaranum og reka og viðlíkahalda trygdarambætaran.

### Fyri TF

Tøkniliga samskiftið við TF fer fram umvegis HUM. Supportin annars fer fram umvegis JSM.

## Ábyrgd, skyldur og tænastur veittar av TF

### Yvirskipað lýsing av tænastunum

Veitingarnar í tænastuni eru:

- Tryggja eina vælvirkandi innliman av luttakarum á Heldina
- Trygt, bronglað samskifti millum luttakarar í Heldini
- Eitt yvirlit yvir tøkar vevtænastur
- Support í sambandi við íbinding og rakstur av trygdarambætara
- Tryggja støðugan rakstur av Heldardeplinum
- Viðlíkahald av HUM

TF hevur skyldu at tryggja, at omanfyri nevndu tænastur verða riknar á tryggan hátt.

TF hevur tó ikki endurgjaldsábyrgd fyri møguligum beinleiðis ella óbeinleiðis tapi, sum luttakarar kunnu hava av nýtslu - ella vantandi nýtslu - av Heldini.

### Góðkenning av luttakarum

Tann, ið ynskir at gerast luttakari í Heldini, skal hava eitt virkið V-tal. Tá søkt verður um íbinding, kannar TF upplýsingarnar í umsóknini, t.d. um navn á luttakaranum og V-tal samsvara. Útflýggjan av sertifikati og endaliga íbindingin er treytað av, at upplýsingarnar eru rættar.

### Sertifikat og forrit

Sum høvuðstáttur í trygdini í Heldini veitir TF sertifikat og forrit, sum eyðmerkja luttakarar og bronglar samskifti millum hesar.

### Yvirlit yvir tøkar vevtænastur

Allir luttakarar, vevtænastur, KT skipanir, trygdarambætarar og ábyrgdarpersónar hjá luttakarunum í Heldini, verða skrásettir í HUM. Skipanin vísir yvirlit yvir tøkar tænastur, og hetta yvirlitið er alment á [www.heldin.fo](http://www.heldin.fo)

## Atgeingi og tænastuvindeygu

Heldin er tøk alt døgnið, allar dagar í árinum.

Tænastuvindeygu, har TF fremur ábøtur og dagføringar av Heldini, skulu fráboðast í góðari tíð frammanundan, um hetta ávirkar vevtænastur hjá luttakarum.

Bráðfeingis ábøtur og dagføringar verða ikki altíð fráboðaðar, men kunnað verður altíð um ábøturnar aftaná.

So vítt gjørligt skulu tænastuvindeyguni, undir hesum feilrættingar, fremjast sum partur av vanliga rakstrinum og uttan at hetta ávirkar atgeingi til tænastur umvegis Heldina.

## Support

Allar fráboðanir um feilir, hjálp og trupulleikar skulu beinast til JSM, við at stovna sak í https://support.talgildu.fo undir "Heldin support til stovnar og fyritøkur".

Heldin support hevur opið vanliga arbeiðstíð.

## Trygdaravritan

TF hevur ábyrgdina av trygdaravritan av Heldardeplinum.

TF ger stakroyndir av avritum av Heldardeplinum.

## Yvirvaking

TF yvirvakir Heldardepilin og hevur møguleika at yvirvekja trygdarambætararnar hjá luttakarunum. Metir TF, at álvarslig trygdarbrot eru framd, t.d. talgild álop, virus, hakking o.s.fr., hevur TF heimild at fremja tey trygdarinntriv, sum mett vera neyðug t.d. at nokta viðkomandi myndugleika atgongd til Heldina, til viðurskiftini eru komin í eina trygga legu aftur.

## Logging

Heldin loggar einki samskifti millum luttakarar.

# Ábyrgd og skyldur hjá luttakarum

## Ábyrgdarin

Stjórin, ella ein av stjóranum útnevndur persónur, hevur yvirskipaðu ábyrgdina av teimum pørtum av Heldini, sum luttakarin varar av, t.d. trygdarambætara og vevtænastu, sí annars kapittul **Samskiftispersónar** omanfyri.

## Tøkniligir persónar

Ábyrgdarin av Heldini útnevnir ein ella fleiri tøkniligar persónar, sum hava ábyrgdina av tekniska samskiftinum, sí annars kapittul **Samskiftispersónar**, omanfyri.

## Yvirskipað lýsing av skyldum

Luttakarin hevur skyldu til at tryggja:

- Rakstur av egnum trygdarambætara
- At flokking er framd sambært fylgiskjalið 1 Dátuflokking.
- At trygdaravrit verður gjørt av trygdarambætara
- At gera politik og mannagongd fyri at handfara loggar á trygdarambætara

## Áðrenn íbinding

Luttakarin skal flokka dáturnar í teimum KT skipanum, sum skulu knýtast í Heldina. Hetta skal gerast eftir leisti lýstur í fylgiskjali 1 Dátuflokking.

Vevtænastur verða meldaðar til Heldina við at útfylla eitt oyðublað, saman við lýsing av skipan, í HUM, umframt at senda sertifikatumbøn (CSR) frá trygdarambætara, sum eisini verður avgreidd umvegis HUM.

Luttakarin eigur eisini at kanna, um ein líknandi vevtænasta finst frammanundan, og um so er, heldur gera nýtslu av verandi vevtænastu. Meginreglan er, at ein ávís vevtænasta bert eigur at vera til staðar eina ferð í Heldini.

## Change Management

Tænastuveitarar skulu hava eina change management mannagongd, fyri at tryggja at tænastubrúkarar ikki fáa feilir í samband við broytingar og dagføringar. Vevtænastur kunnu leggjast út í ymiskum útgávum, sum eru virknar samstundis.

Change Management skal tryggja, at broytingar av tænastum í Heldini verða verksettar rætt og ikki ávirka skipanir, servarar og net skeiva vegin.

Tað ábyrgdarpersónurin hjá luttakaranum, ið hevur ábyrgdina av Change Management av sínum vevtænastum í sambandi við Heldina. Ábyrgdarpersónurin hjá luttakaranum skal tryggja, at hansara vevtænastubrúkarar fáa fráboðan um broytingar í góðari tíð, og at teir fáa at vita, hvørjar broytingar og ábøtir skulu gerast hjá teimum, fyri at tryggja støðugan og framhaldandi rakstur. Change management skal eisini tryggja, at tað ber til at rulla aftur til eina fyrrverandi støðu, sum virkar, um ein broyting hevur óvæntaðar trupulleikar við sær.

## Trygdarambætari og tilknýttar skipanir

Luttakarin hevur ábyrgdina av trygdini á trygdarambætaranum, bæði tá talan er um fysiska trygd, brúkaraatgongd og herðing. Somuleiðis hevur luttakarin ábyrgdina av at tryggja samskiftið millum trygdarambætara og KT skipan. Luttakarin eigur at umhugsa at seta serlig tiltøk í verk í hesum samskifti, t.d. bronglað samskifti við SSL lyklum og/ella bert at loyva ávísum IP adressum atgongd.

Meginreglan er, at ein luttakari bert hevur loyvi at binda sínar egnu skipanir í sín trygdar-ambætara. Ynskja luttakarar at víkja frá hesari meginreglu, skulu teir venda sær til TF við hesum fyrispurningi.

TF kann veita support í samband við trygdaruppsetingina.

## Logging

Trygdarambætarin hjá luttakarunum førir log yvir framdar fyrispurningar/svar umvegis Heldina. Neyðugt er hjá luttakaranum at fyrihalda seg til hesar loggar og at skipa fyri, at hesir verða annaðhvørt goymdir ella strikaðir, alt eftir hvat tørvurin hjá luttakaranum er.

Allir luttakarar nýta felags tíðarstempultænastu (TSA - http://tsa.samleiki.fo/tsa) til at framleiða eina talgilda undirskrift, ið verður knýtt at hvørjum einstøkum fyrispurningi/svari umvegis Heldina. Henda tíðarstempultænastu hevur ein almennan lykil, ið luttakarin seinni kann nýta til at avbrongla (dekryptera) ein fyrispurning/svar og soleiðis vátta, at tíðspunktið og innihaldið er óbroytt. Fortreyt fyri nýtslu at hesum hentleika er, at luttakarin hevur goymt log-fílin fyri einstaka fyrispurningin/svarið á sínari síðu.

## Trygdarhendingar

Einhvør trygdarhending, ella misnýtsla av upplýsingum ella skipanum, sum eru knýttar í Heldina, skal verða fráboðað TF. Um ein trygdarhending verður staðfest, so hevur luttakarin skyldu at gera neyðugar ábøtur, fyri at tryggja framhaldandi rakstur.

Gerst luttakarin varugur við, at møgulig trygdarbrot eru framd á kervi ella skipanir tess, t.d. virus álop, hakking o.s.fr., skal luttakarin alt fyri eitt boða TF frá hesum.

Um mett verður at álvarsligt trygdarbrot er framt, kann TF nokta einum vevtænastuveitara ella -brúkara atgongd til Heldina til viðurskiftini eru komin í eina trygga legu aftur.

Álvarslig trygdarbrot umfata t.d. vanrøkin ella illviljaði starvsfólk, talgild álop, virus, hakking.

Luttakarin skal boða TF frá umvegis fylgjandi miðlar:

- Telefon: 35 24 90
- JSM

Tá luttakarin setur seg í samband við TF, er neyðugt at upplýsa:

- Navn á ábyrgdara hjá luttakara
- Skipan ella vevtænasta, sum luttakarin nýtir
- Nær hendingin er farin fram, t.e. dag og klokku

## Stýring av atgongd

Tá ein luttakari er knýttur í Heldina, hevur hann sjálvur ábyrgdina av at stýra atgongd og rættindum hjá vevtænastubrúkarum. Hetta verður fyrst og fremst sett upp í trygdarambætaranum, men um tað er neyðugt, kann ein neyvari stýring eisini gerast í KT-skipanini hjá luttakaranum.

Loyvini, sum verða givin í trygdarambætaranum, siga bert, hvør stovnur sleppur inn at gera ein ávísan fyrispurning, men kunnu ikki avgera, hvørt starvsfólk ella brúkari hjá einum myndugleika, stovni ella virki fær atgongd til eina ávísa vevtænastu ella dátu. Tí kann ein neyvari stýring vera neyðug í KT-skipanini hjá luttakaranum. Tað er ábyrgdin hjá luttakaranum at avgera, hvussu neyva stýring av atgongd er neyðug til eitt ávíst endamál.

## Brúkaratrygd

Starvsfólk eru ein týðandi partur av, at Heldin er ein virkin og álítandi skipan, tí verður mælt til, at krøv verða sett til tey starvsfólk, ið hava atgongd til trygdar- og millumambætaran.

Hvør brúkari á trygdarambætaranum skal hava sítt persónliga login, so tað sæst hvør loggar á.

## Tilbúgvingarætlan

Mælt verður til, at luttakarar í Heldini hava eina tilbúgvingarætlan, sum lýsir hvat verður gjørt um ein hending fer fram, sum ávirkar raksturin.

Vegleðing til tilbúgvingarætlan er lýst í fylgiskjali 2 Tilbúgvingarætlan.

### Trygdaravrit

Tað er ábyrgdin hjá luttakaranum at taka trygdaravrit av sínum egna trygdarambætara og at hava mannagongdir til at endurskapa trygdarambætaran. Tað er týðandi, at luttakarin eisini hevur eitt dagført yvirlit yvir, hvussu trygdarambætarin er settur upp, og hvørji loyvir eru givin.

### Útbúnaður

Luttakarin hevur ábyrgdina av, at útbúnaðurin er í nóg góðum standi og svarar nóg skjótt og skal eisini halda viðlíka og umvæla tøkniliga útbúnaðin um neyðugt. Hetta umfatar internetsamband, firewall, lokalt net, trygdarambætara, millumambætara og annan útbúnað til rakstur av KT kervinum hjá luttakaranum.

### Menning av forritum

Forrit, sum verða ment til Heldina, skulu fylgja protokollunum til SOAP og ReST, sum eru lýstar her: https://docs.x-road.global/#protocols.

Mælt verður til, at luttakarar seta seg í samband við TF, áðrenn farið verður í gongd at menna eina vevtænastu.

## Prísmyndil

Tað er ókeypis hjá almennum myndugleikum[1] at knýta í og brúka Heldina. Allar aðrar útreiðslur, so sum menning av vevtænastum, uppseting og rakstur av trygdarambætara, gjalda allir luttakarar sjálvir fyri.

Kommunur, virkir og feløg gjalda fyri at knýta í og brúka Heldina. Galdandi prísir eru at finna á https://talgildu.fo.

## Endurskoðan av sáttmála

Hesin sáttmáli kann broytast av TF við 3 mánað varningi.

## Fráboðan

TF hevur skyldu at boða luttakaranum frá, um feilir ella broytingar eru, ið kunnu ávirka arbeiðið hjá luttakaranum. Hetta verður gjørt við at senda luttakaranum teldubræv ella, í meira átrokandi førum, við at ringja til luttakaran.

[1] Ein almennur myndugleiki er sambært rundskrivinum um Heldina aðalráð, stovnar undir teimum, serligir grunnar o.a., umframt sjálvsognarstovnar, sum eru á fíggjarlógini javnbjóðis áðurnevndu almennu myndugleikunum.

## Mishald.

Misheldur luttakarin skyldur sínar sambært hesum sáttmála ella rundskrivinum um Heldina, kann TF taka góðkenningina aftur.

TF hevur heimild til at nokta einum luttakara atgongd til Heldina, um luttakarin misheldur sínar skyldur.

## Force majeure

Hvørki TF ella luttakarin kunnu ábyrgdast fyri, at avtala ikki verður uppfylt til tíðina, tá atvoldin er eitthvørt, sum partarnir ikki hava ávirkan á.

## Uppathald

Um luttakari ynskir at taka seg úr Heldini, skulu skrivlig boð sendast til TF, ið tekur neyðugu loyvini aftur, so luttakarin gert óvirkin. Tað er ábyrgdin hjá luttakaranum at fráboða teimum luttakarum, sum hann letur ella fær dátur frá, um uppathald.

## Undirskrift

Fyri _________________________________ V-tal: ____________

Navn: _______________________________ Dagfesting: ____________

Undirskrift: ________________________________________

Fyri TF (Gjaldstovuna)

Navn: ____________________________ Dagfesting: ____________

Undirskrift: ___________________________________